# Teitur stóri vinnarin



*Niels Holm, stjóri í Norðurlandahúsinum, handar pápa Teit Lassen, Jógvan Páll Lassen, tær fýra AME virðislønirnar, ið Teitur vann*

**Teitur Lassen gjørdist stóri vinnarin, tá AME heiðurslønirnar vóru handaðar leygarkvøldið. Teitur vann fýra av teimum 14 heiðurslønunum. Festivalar hava bjóðað bólkum at spæla og Vega í Keypmannahavn er eisini áhuga í ávísum bólkum**

AME 2005
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Atlantic Music Event fór fram í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið í samband við endabrestin í Prix Føroyar kappingini. AME heiðurslønir vóru handaðar fólki innan føroyskt tónleikalív og Teitur Lassen gjørdist stóri vinnarin, tá hann vann sær 4 av teimum 14 heiðurslønunum.

Teir ymsu festivalarnir her heima og í grannalondunum valdu sær luttakarar úr rúgvuni av føroyskum fyrstafloks tónleiki og VEGA í Keypmannahavn er áhuga at endurtaka væleydnaða tiltakið frá í fjør - Atlantic Music Event - har Gestir, Eivør og Makrel spældu. Men hesaferð verða tað 200, Makrel og Gestir.

## AME

Listakvinnan Vígdis Petersen hevði evnað til ein prýðislut, har AME stóð á. Soleiðis fullu AME heiðurslønirnar.

***Besta fløga:*** Teitur Lassen, Poetry & Aeroplanes
***Mest spælda lag í ÚF:*** Páll Finnur Páll, Forelskaður sjónleikari
***Mest selda fløga:*** (Fínteljing fer fram millum Týr og TrøllaPætur)
***Besta átak uttanlands;*** Teitur Lassen
***Herðaklappið:*** Teitur Lassen
***Besti produsári:*** Óli Poulsen
***Besti fløguhúsi:*** 200, Viva la republica
***Besti trummuleikari:*** Rógvi á Rógvu
***Besti bassleikari:*** Arnold Ludvig
***Besti ljómborðspælari:*** Kim Hansen
***Besti guitarleikari:*** Rasmus Rasmussen
***Besti bólkur:*** GoGo Blues
***Besta lag:*** Teitur Lassen, Josephine
***Besti sangari:*** Eivør Pálsdóttir



***Páll Finnur Páll fingu virðisløn fyri mest spælda lag í Útvarpi Føroya***

## Festivalar

Ein av gularótunum hjá tónleikarum er, at umboð frá ymsum festivalum eru til staðar til AME, og skulu velja sær bólk at leika á sínum festivalum í summar.

Soleiðis valdi umboðini:
***Svøríki, Peace and Love festival:*** Eivør Pálsdóttir
***Klaksvík, Summarfestivalurin:*** Týr
***Danmark, Nibe Festivalurin:*** Høgni Lisberg
***Danmark, Jelling Festival:*** Eivør Pálsdóttir
***Gøta, G!:*** GoGo Blues
***Grønland, Nibia:*** 200
***Grønland,*** (Navnið er okkum ógreitt): Eivør Pálsdóttir og Guðrun Sólja Jacobsen
***Noreg, Storås Festival:*** Makrel

Afturat hesum hevur Vega í Keypmannahavn sum nevnt víst áhuga og seinni verður konsert har við Gestum, Makrel og 2oo. Dagfesting er ikki ásett enn.